

# GOO-harradømi á internetinum

EITT LÍTIÐ, RUNT **G** TIL HØGRU Á TÍNUM **TELDUSKÍGGJA** STÝRIR TÆR NÓGV MEIRA, ENN TÚ ÁNAR. PRIVATA FYRITØKAN **GOOGLE** FÆR MEIRA OG MEIRA VALD Á **INTERNETINUM**, OG SPURNINGURIN ER, HVAT HENDIR TÁ EIN EINSTØK FYRITØKA STÝRIR ALT MEIRA AV OKKARA **SAMSKIFTI** Á NETINUM. VIKUSKIFTI HEVUR LISIÐ **"GOOGLE KODEN"** - OG VIT ERU EITT SINDUR **RÆDD**, MEN EISINI **IMPONERAÐ**



**GOOGLE**
Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

Andreas Ekstrøm eitur journalisturin, ið hevur skrivað reportasjubókina "Google-koden". Hann hevur vitjað Google í Kalifornia og tosa við fólkið aftanfyri eina av heimsins skjótast veksandi fyritøkunum.

Skapanarsøgan hjá Google líkist tí hjá nógvum øðrum KT-fyritøkum. Nakrir lesandi, ungir menn fáa eitt hugskot og gerast milliarderar. Men meðan flestu aðrir selja fyritøkurnar og liva gott av peninginum, so arbeiða stovnararnir Larry Page og Sergey Brin enn á Google.

Tað var 1995 á Stanford Universitetinum uttanfyri San Fransisco, at teir báðir hittust og byrjaðu at arbeiða saman. Googol, sum Google var kallað frá byrjan, gjørdist til Google, tá ið onkur stavaði navnið skeivt. Merkið varð stovnsett í 1998.

Fyrstu trý árini tjenti Google ikki eitt oyra - stovnararnir vónaðu bara, at teirra skapanarverk fór at geva úrslit fyrr ella seinni.

Fyri at gerast størri var neyðugt at fáa meiri telduorku, og fyri at fáa tað, vóru pengar neyðugir. Adam Bechtolsheim eitur íleggjarin, ið gav teimum báðum Larry og Sergey 100.000 dollarar, og teir kundu keypa størri servarar.

Fyrstu fimm árini vaks Google við 400.000 prosentum. Google gjørdist eitt sagnorð, at samanbera við at eta ella at renna. Um nakar spyr okkurt, er tað vanligt, at vit svara "googla tað", Og at googla gera vit nógv - umleið 20.000 leitingar um sekundið eru á Google.

Slagorðið hjá Google er "Don't be evil", sum merkir umleið "Ver ikki óndur" - við tí vilja teir siga, at Google skal vera ein góð fyritøka, ið ger heimin til eitt betri stað at vera. Tað ljóðar sum eitt gott slagorð, men hóast tað, finnast nógv at Google og tí monopolið, teir eru í ferð við at byggja á internetinum.

Høvundin til bókina "Google koden", Andreas Ekstrøm, spældi við tankan at skriva bókina uttan at nýta Google fyri at leita eftir tilfari, hann gav upp - tað bar ikki til. Hann kom eisini við hugskotinum um ein "Google-frían dag", men sjálvur kiksaði hann longu kl 06:50 sama dag, tá hann lat Google-kalandaran upp uttan at hugsa seg um.

Google er ein stórur partur av okkara lívi á internetinum - størri enn nógv av okkum hugsa um.

### Egið busskerv

Høvuðsskrivstovan hjá Google eitur Googleplex og er í Kalifornia. Har starvast umleið 20.000 fólk. Tey hava sítt egna busskerv, har ongin skal nýtast at ganga meira enn 800 metur til bussin. Tey fáa ókeypis mat, kunnu lata síni klæði til vaskaríið, og 20 prosent av arbeiðstíðini fer til egin projekt, ið ikki nýtast at vera fíggjarliga berandi, men nýskapandi.

Andreas Ekstrøm lýsir Googleplex sum eitt universitetsøki, heldur enn eitt arbeiðspláss. Klædningar eru ikki nógvir at síggja, og tað er komið fyri, at fólk eru komin til arbeiðis í náttklæðum.

Fyri nøkrum árum síðani var tað sera óvanligt at nakar gavst á Google, men síðani Facebook og Twitter eru komin, eru tað fleiri, ið hava valt at byrja har ístaðin. Google hevur skrivstovur í 30 ymiskum londum.

Størsta verkætlanin, ið nú er í gongd, er Google Books. Ætlanin snýr seg um at skanna allar heimsins bøkur inn og gera tað gjørligt at finna tær á Google. Ljóðar kanska sum ein óveruligur dreymur, men er tað nakar, sum kann fáa tað at bera til, er tað Google.

## Soleiðis tjenar Google pengar

**Adwords og Adsense.** Soleiðis kallast lýsingarhættirnir hjá Google. Felags fyri báðar er, at man skal gjalda fyri hvørt klikk. Um lýsarin hevur ráð til 1.000 klikk fyri 2 krónur stykki, hvørvur lýsingin, tá peningurin eru uppi.
**Adwords** er tað, sum kemur upp til høgru og sæst í gulum, tá tú til dømis leitar eftir skógvum - tá koma lýsingar fyri skógvar upp í teiginum til høgru ella er markerað við gulum.
**Adsense** ger, at allar heimasíður í heiminum kunnu gerast lýsingarøki hjá Google. Við at klistra eina teldukotu inn á tína heimasíðu síggjast lýsingar, sum passa til tína heimasíðu, har. Tú fortjenar eitt sindur, um tú hevur nógv vitjandi, og Google fortjenar sera nógv, tí milliónir og aftur milliónir av brúkarum klistra hesa kotuna inn á sína heimasíðu.
Lýsingar við **Adwords standa fyri 66 prosentum** av inntøkunum hjá Google og **Adsense fyri 31 prosentum**.
**Restin - 3 prosent** - kemur frá stórum fyritøkum, sum gjalda eyka fyri at goyma data hjá Google.